Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	27.01.2026
Mál nr.:	25/20102
Málsviðgjørt:	TM, JS, DH, JEK og BAB
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	12.01.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning
(Tøknilig rætting í sambandi við avgjald á leyst snús, sum inniheldur tubbak)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025, verður skjal 1 broytt sum ásett í skjali 1.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Skjal 1

Í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna í skjali 1 til løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 verður hetta vørunummar sett inn í kap. 24:

Vøru nr.	**Punkt avgjald**	**Punkt avgjald**	**Vøruslag**
2403.99.35	0	800,00 kr. pr. kg.	Leyst snús sum inniheldur tubbak

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Talan er um eina lógartøkniliga rætting í sambandi við løgtingsmál nr. 18/2025. Í sambandi við løgtingsmál nr. 18/2025, ið hækkar avgjøldini á snús og tubbak, hevur tað víst seg at vera neyðugt at gera eina lógartøkniliga rætting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

Broyting nr. 4 í § 1 í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning ásetti, at:

"Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.99.20 til 2403.99.90 í 3. teigi broytt frá "144,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg.", tó so, at punktavgjaldið á vørunummarið 2403.99.35 verður ásett til "800,00 kr. pr. kg.""

Rættingin í hesum lógaruppskotinum snýr seg um at seta inn vørunummarið 2403.99.35 í kapittul 24 í frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning og løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning. Vørunummarið 2403.99.35 er ikki í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at seta inn vørunummarið 2403.99.35 í kapittul 24 í frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning. Broytingin er lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Nýskipanin við lógaruppskotinum er at seta inn vørunummarið 2403.99.35 í kapittul 24 í frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning. Broytingin er lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur. Broytingin er lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur. Broytingin er tó lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Uppskotið hevur ikki aðrar fíggjarligar avleiðingar enn, at roknast kann við minni sølu av tubbaki og snúsi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at hava við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Broytingin við hesum lógaruppskotinum er lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning. Broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um

broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning hava við sær hægri avgjald á tubbak og snús.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava við sær aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við broytingini í § 1 verður vørunummarið 2403.99.35 sett inn í kapittul 24 í frumskjali 1 í skjali 1 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning. Broytingin er lógartøkniliga neyðug fyri at fremja ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg nr. 217 frá 22. desember 2025 um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

Fíggjarmálaráðið, 27. januar 2026

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Tórir Michelsen